| Tín fyrireiking | Títt virkni í tímanum | Tín tørvur | Úrslit hjá bólkinum | Úrslit hjá flokkinum |
|---|---|---|---|---|
| *Tú hevur ikki lisið.* | Tú kanst bert vera óvirkin. | Tú fært bert nakað burturúr, um byrjað verður við, at greitt verður frá innihaldinum av tekstinum.<br><br>Úrslitið hjá tær verður grunt, og tú hevur skjótt gloymt alt. | Tú hevur einki at geva í bólkaarbeiðinum. Tú ert ein óbrúkiligur samstarvspartnari. | Um undirvísingin skal nøkta tín tørv, er tað tíðarspilla hjá teimum, sum hava fyrireikað seg heima.<br><br>Tú hevur einki at geva í flokkinum. Úrslitið hjá flokkinum er fullkomiliga tengt at, at allir næmingar arbeiða. |
| *Tú hevur bert skundað tekstin ígjøgnum uttan at geva tær far um, hvat tú hevur lisið.* | Tú hevur ein óvirknan leiklut. | Bert um undirvísingin ella bólkaarbeiðið byrjar við at greiða frá innihaldinum av tekstinum, hevur tú møguleika fyri at fylgja við og náa upp á eitt greiningarstøði. | Tú ert ikki klár/ur til at samstarva. Tú kanst ikki geva bólkinum eitt innspæl.<br><br>Bólkaarbeiðið verður keðiligt fyri bólkalimirnar, sum hava fyrireikað seg.<br><br>Tú ert ein vánaligur samstarvspartnari. | Um undirvísingin skal nøkta tín tørv, er tað í stóran mun tíðarspilla hjá teimum, sum hava fyrireikað seg og arbeitt við tekstinum heima.<br><br>Tú hevur sera lítlan kjans at økja um samlaða úrslitið hjá flokkinum. Flokkurin er bundin av, at øll hava fyrireikað seg væl. |
| *Tú hevur lisið tekstin og skilt han.*<br><br>*Tú hevur funnið útav, hvat tú skilir, men tú hevur ikki fingið nóg gott yvirlit yvir tekstin* | Tú hevur møguleika fyri at vera virkin í tímunum | Tú hevur tørv á, at undirvísingin byrjar á. greiningarstøði, so tit í flokkinum kunnu gera greiningararbeiðið liðugt. Tú kemur ikki upp á metingarstøði. | Bólkurin kann fáa eitt úrslit, um allir bólkalimir hava fyrireikað seg á sama hátt sum tú. Tit noyðast tó at nýta rættiliga fitt av tíð til at fáa yvirlit yvir tekstin. | Tú kanst, av tí at tú kennir tekstin, geva flokkinum innspæl viðvíkjandi greining, so tað ber til at koma upp á metingarstøði. |
| *Tú hevur lisið tekstin gjølla - og arbeitt við honum.*<br><br>*Tú hevur greinað tekstin gjølla, t.e. funnið megintættir fram og hugsað um teir í mun til hvønnannan. Tú hevur gjørt uppskriftir og orðað spurningar, sum tú ynskir at fáa svaraðar í undirvísingini* | Tað er púra greitt, at tú ert virkin í tímunum. | Tú ert bundin av, at onnur enn tú hava fyrireikað seg gjølla.<br><br>Tú hevur ikki brúk fyri, at undirvísingin byrjar við at greiða frá innihaldinum av tekstinum. Tú ert klár/ur at fara beint til metingarstøði. | Tú kanst geva bólkinum heilt nógv. Tú ert bundin av, at aðrir bólkalimir eisini hava fyrireikað seg gjølla. Hava teir tað, kunnu tit røkka langt og fáa eitt stak gott úrslit í tímunum. | Tú kanst geva rættiliga nógv, men úrslitið hjá flokkinum kann bert gerast gott, um onnur eisini hava fyrireikað seg gjølla. Um øll hava fyrireikað seg sum tú, verður úrslitið í flokkinum frálíkt |

Orðið “tekstur” er í hesum høpi at skilja sum øll sløg av heimaarbeiði, likamikið um talan er um enskt ella støddfrøði.